## Fjaldu rúsevni

Tvær 17 ára gamlar gentur í Íslandi verða nú skuldsettar fyri at hava havt rúsevni uppi á sær og tað í orðsins sanna týdningi. Í einum vanligum eftirliti á hvítusunnu steðgaði løgreglan á Borgarnesi einum bili. Í bilinum vóru tvær ungar gentur og ein maður, sum er miðskeiðis í 20'unum. Tað vísti seg, at genturnar høvdu fjalt 40 gramm av kokaini í hítum, sum tær høvdu stungið upp í seg. Málið er latið barnaverndini, tí genturnar eru so ungar.



## Spælipláss fekk stuðul

Við hjálp frá Runavíkar kommunu hevur ein sjálvboðin áhugabólkur gjørt eitt spælipláss í Rituvík. Plássið, sum er 1700 fermetrar stórt, hevur millum annað sparkivøll, men bólkurin hevur gjørt av at gera eitt felags grillpláss við borðum og bonkum og eina felags grill á plássinum. Tí søkti bólkurin Eik Grunnin um stuðul, og á partaeigarafundi hjá Eik í Runavík í síðstu viku fekk bólkurin 50.000 krónur í stuðuli frá grunninum.

## Rænarar gjørdu størst skaða á seg sjálvar

**Deildarleiðarin hjá Føroya Banka í Eysturoynni, Leivur Højgaard, sigur, at rænararnir ikki hava gjørt nakran skaða á bankan, burtursæð frá tí, at teir brutu ein rút fyri at sleppa inn. – Størsta skaðan, teir hava gjørt, er á seg sjálvar, sigur Leivur Højgaard**

INNBROT
*Rólant Waag Dam*

Leivur Højgaard, deildarleiðari hjá Føroya Banka í Eysturoynni, ynskir ikki at upplýsa, hvat goymdi seg í boksunum, sum tveir mans royndu at ræna úr deild bankans á Toftum leygarnáttina.

– Tað dámar mær ikki at upplýsa, men talan var altso um tvær pengaboksir, upplýsir deildarleiðarin í Eysturoynni.

– Men menninir høvdu ikki gjørt nakran skaða á bankan sum so. Teir hava brotið ein rút, og síðani roynt at toga boksirnar út. Nei, størsta skaðan teir hava gjørt, er á seg sjálvar, heldur Leivur Højgaard.

### Vaktur av løgregluni

Leivur Højgaard varð vaktur av løgregluni leygarnáttina, tá innbrotið var.

– Innbrot eru altíð keðilig, og sjálvandi gjørdist eg eitt sindur kløkkur. Man roknar jú ongantíð við tílíkum, so eg skundaði mær avstað, tá boð vóru send eftir mær, sigur Leivur Højgaard, og leggur so aftrat, at innbrotið er nógv størri skandala hjá teimum báðum monnunum, enn hjá bankanum.

# Ætlaðu at ræna pengaboks

**Leygarnáttina brutu tveir mans inn í Føroya Banka á Toftum. Teir ætlaðu at stjala tvær bankaboksir, og høvdu fingið aðra út í tún, áðrenn løgreglan kom á staðið og handtók teir**

INNBROT
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Klokkan 01.29 leygarnáttina varð ringt til løgregluna, tí onkur segði seg síggja fólk inni í Føroya Banka á Toftum. Løgreglan í Runavík fór á staðið, og beinanvegin teir koma, síggja teir ein mann tuska avstað. Hann kom tó ikki langt, tí løgreglan bar skjótt at og fekk fatur í honum.

Men løgreglan hevði illgruna um, at ein annar maður var uppi í leikinum eisini. Tískil kom hundapatruljan úr Havnini norður, og eftir eina løtu høvdu teir funnið ein mann, sum fjaldi seg í einum bygningi nærhendis.

### Royndu at ræna pengaboks

Menninir royndu at ræna tvær pengaboksir út úr bankanum. Teir knústu ein rút omanfyri bankan og sluppu sær inn tann vegin. Uttanfyri høvdu teir sett ein Ford Courier vøruvogn, og hesin skuldi helst brúkast, tá teir skuldu rýma avstað við pengaboksunum.

Teir báðir menninir, sum eru frá 1981 og 1983, vóru komnir nakað ávegis í brotsgerð teirra, áðrenn løgreglan kom. Onnur pengaboksin var fingin út í tún, meðan hin stóð beint innanfyri hurðina.

### Kriminalløgreglan yvirtikið málið

Kriminalløgreglan hevur nú yvirtikið málið, og teir báðir handtiknu menninir eru avhoyrdir. Annar hevur játtað seg sekan, meðan hin noktar. Tískil er hann varðhaldsfongslaður til næsta fríggjadag, meðan hin er leyslatin.

Eisini hevur løgreglan avhoyrt onnur fólk. Nú verður arbeitt víðari í málinum og kanningar vera gjørdar av gerningsstaðnum.

Løgreglan sigur annars, at teir báðir menninir eru skuldsettir fyri innbrot – ikki bankarán. Talan er bert um bankarán, tá rænararnir so ella so hava hótt seg til pening. Men í hesum førinum varð eingin hóttur, og tá menninir brutu sær veg inn í bankan, verður altso talan um innbrot.



*Føroya Banki soleiðis sum hann sær út frá vegnum*



*Omanfyri høvdu rænararnir brotið ein rút, sum teir sluppu sær inn ígjøgnum. Nú er pláta sett fyri*



*Innanfyri hurðina síggja vit báðar boksirnar, sum ungu menninir høvdu roynt at ræna*




*Ford Courier vøruvognurin stóð klárur framman fyri hurðina, har pengaboksirnar skuldu koyrast út*